

*Umframt framleiðslu av ketlum og fjarhitaeindum, ger Hógv eisini innleggingar av hitaverki, ventilatión og saniteti*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ketlarnir hjá Hógv CE-góðkendir

**Tann 28. apríl í ár vórðu ketlarnir hjá virkinum, Hógv í Søldarfirði, CE-góðkendir. Ein slík góðkenning tryggjar, at dygdin er á høgum støði, og at orkunýtslan er so lág sum gjørligt**

FRAMLEIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Føroyum eru eingi krøv til innfluttar vørur. Alt kann keypast ella seljast. Hinvegin hava øll framkomin lond reglur fyri, hvat kann innflytast ella brúkast í teirra landi.

– Lond sum Ísland og Noregi hava somu reglur sum ES-londini, hóast tey ikki eru limir. Somuleiðis hava londini egnar løggildar kanningarstovur.

Jákup Olsen, stjóri á Hógv, sigur, at CE-góðkenningin, sum virkið nú hevur fingið, tryggjar, at dygdin av framleiðsluni er á høgum støði, og at orkunýtslan er so lág sum gjørligt.

– Ein vøra, sum er CE-merkt, kann frítt innflytast til øll ES-lond og flestu onnur lond við.



*Her húsast P/F Hógv Handilsvirki í Søldarfirði, sum nú hevur fingið fyrsta CE-merkið í Føroyum fyri sínar ketlar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Nógv arbeiði

Men hvussu fæst so ein slík góðkenning?

– Tað er nógv arbeiði av at fáa ketlar testaðar og góðkendar, og hetta kostar eisini nógvan pening.

Jákup heldur, at tað er ivasamt, um Hógv hevði megnað at fingið góðkenningina upp á pláss einsamalt.

– Við dyggum stuðli frá BP Amoco Exploration og Vinnuframagrunninum, bar til at gjøgnumføra verkætlanina, sigur stjórin.

Hann vísir á, at tað er serliga tann parturin, sum BP hevur stuðlað við - bæði peningaliga og á annan hátt, sum gjørdi góðkenningina til veruleika.

– Tað nøgva praktiska arbeiði og ein hópur av pappírsarbeiði, er ikki nakað, ið smáar fyritøkur, sum vit, eru serliga glaðir fyri.

Stjórin sigur, at Jákup Mørkøre á TK-stovuni eisini hevur verið Hógv til stóra hjálp við góðkenningini og hevur "skumpað undir" alla tíðina, sum hann tekur til.

– Tíverri varð TK-stovan avlívað, og einki alternativ er fyri føroyskar fyritøkur, ið royna at bøta um handilsjavnan, leggur hann aftrat.

### 15 ár á baki

Síðan Hógv byrjaði at framleiða ketlar fyri umleið 15 árum síðan, er nógv hent.

Jákup sigur, at nýggjastu ketlarnir hjá virkinum eru sera bíligir í brúki; teir brenna lítla olju, og dygdin er í serflokki.

Í dag standa fleiri enn 900 ketlar hjá Hógv uppi í Føroyum.

Á virkinum arbeiða 6-8 fólk. Høvuðsframleiðslan er ketlar, men virkið tekur sær eisini av øðrum uppgávum, eitt nú HVS-innleggingum í sethús og størri bygningar. Haraftrat hava teir sett upp ventilatiónsskipanir í nógv ár.

Stjórin sigur, at nýggjasta framleiðslan hjá virkinum er tað, sum rópt verður, fjarhitaeindir.

– Vit hava í longri tíð arbeitt við at menna eina fjarhitaeind, bæði til føroysk viðurskifti og til útflutnings.

Hann sigur, at nakrar eindir standa longu uppi í Havn, og í nærmastu framtíð verða fjarhitaeindir frá Hógv at fáa til keyps.

– Okkara skipanir eru væl kappingarførar í prísi, og tær eru lættar at halda við líka, sigur Jákup Olsen.

### Í Søldarfirði

Hógv Handilsvirki, sum felagið eitur, er eitt partafelag, sum hevur verkstað, goymslu, handil og skrivstovu í Søldarfirði, har handilin hjá PW var áður.

Stjórin í felagnum, Jákup Olsen, er eisini ein av eigarunum.



*Her eru teir næstan lidnir við ein av vælumtóktu ketlunum, sum Hógv ger*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Ongar próvtøkur á kvøldskúlanum

**Fyri at finna pening til musikkskúlan, er nú eitt uppskot komið um at taka pening av trongu fíggjarætlanini hjá kvøldskúlunum um alt landið**

SPARINGAR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

Upphæddin, sum mundi kostað næmingum á Musikkskúlanum plássið, kemur nú í staðin at kosta nøkrum næmingum á kvøldskúlunum teirra pláss.

200.000 kr. skulu, eftir uppskotið frá mentamálaráðnum, flytast av játtanini frá Kvøld- og Ungdómsskúlanum og til musikkskúlan. Fritleif Henriksen, kvøldskúlaleiðari, hevur leingi verið greiður yvir, at nakrar sparingar máttu gerast. Hann framdi í fjør nakrar sparingar, men nú 200.000 kr. afturat vóru tiknar av játtanini, varð avgerðin tikin um at strika próvtøkuskeiðið heilt.



*Fritleif Henriksen, kvøldskúlaleiðari, hevur nú verið noyddur at taka alla próvtøkuundirvísing av skránni. – Vit høvdu stramma fíggjarætlan frammanundan, so hesar 200.000 krónurnar gera tað ikki betur, sigur hann.*

### Próvtøkurnar rúka

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur seinastu árini havt eini 270 flokkar og einar 3000 næmingar árliga. Tilboðini, sum skúlin hevur, kunnu býtast í trý: Vanliga kvøld- og frítíðarundirvísingin, próvtøkuundirvísingin og serundirvísingin.

Ein skúli, við so stórum næmingatalið, hevur sjálvsagt sín stóra kostnað, bæði til læraralønir og leigu av hølum.

Til at gjalda útreiðslurnar, fær kvøldskúlin stuðul frá bæði kommununi og landinum. Men hesin hevur ikki verið nøktandi, tí skúlanum vantar útvið eini millión. Og nú koma so 200.000 at vanta í afturat.

– Sambært lógini, skulu kommunan og landið gjalda hvør sína helvt av vanligu frítíðarundirvísingini. Av serundirvísingini og próvtøkuundirvísingini, ber landið allar útreiðslur, greiðir Fritleif Henriksen, kvøldskúlaleiðari frá.

Vanliga frítíðarundirvísingin umfatar alla almennu undirvísingina, har ikki verður endað við próvtøku. Serundirvísingin umfatar ymisk tilboð til menningar- og rørslutarnað og heilsuveik. Til dømis svimjing fyri giktsjúk og menningartarnað, fimleik fyri hjartasjúk og ítrótt fyri autistar.

Próvtøkuundirvísingin umfatar fráfaringarroydir fólkaskúlans, dugnaskaparroyndir í sigling og motorpassing, landbúnaðarútbúgving og radioskeið.

– Eg verði noyddur at spara har, sum flestar krónr fáast fyri fægstar næmingar, og tað er í próvtøkuskeiðunum, sigur Fritleif Henriksen.

Framhaldandi sigur hann, at áhugin ikki hevur verið so stórur fyri fráfaringarroyndunum seinastu árini, men at siglingar og motorpassaraskeiðið er væl umtókt.

– Tað er sjálvsagt spell at skula spara nakað burtur, tí sparingar raka jú altíð onkran. Men eg verði noyddur at skerja okkurt, og tað verður próvtøkuskeiðið, sigur Fritleif Henriksen.

### Vónandi bert fyri eitt ár

Fritleif sigur, at hansara mál er at varðveita vanligu frítíðarundirvísingina. Tað er sera stórt trýst á Kvøldskúlan, sum ikki megnar at nøkta stóra tørvin, sum er.

– Àhugin fyri kvøldskúlanum er sera stórur, og við verandi játtan megna vit ikki at standa mát við stóra trýstið, sum er á skúlan. So tað ger tað ikki betri, at peningur nú verður tikin frá okkum. Men tað er einki at gera við tað, soleiðis má tað bara vera, heldur Fritleif.

Lýsingar yvir skeiðini, sum verða á skránni í kvøldskúlanum komandi vetur, eru farnar út í bløðini. Einki próvtøkuskeið er at finna.

Fritleif sigur, at hann eisini hevur roynt at verja serundirvísingina fyri menningar- og rørslutarnað og heilsuveik.

– Hóast tað er eitt rættiliga dýrt skeið, vildi eg ikki taka tað av skránni. Men eg vóni, at játtanin verður hækkað aftur næsta ár, soleiðis, at fólk kunnu fyrireika seg til próvtøkur á kvøldskúlanum aftur, sigur Fritleif Henriksen at enda.

# Vatn í Norðoyatunlinum

Í síðstu viku varð vatn funnið í Norðoyatunlinum. Dávur Reinert Hansen, stjóri í pf Norðoyatunnilin, sigur, at inntil fyri einari viku síðani hava forboringarnar verið rættiliga turrar.

– Men í síðstu viku funnu teir so vatn. Tá fara teir so inn og tetta við sproytubetongi, greiðir Dávur frá.

Tað er soleiðis, at forboringarnar í tunlinum eru 38 metrar, har so staðfestast skal, um vatn er í ella ikki. Tá tað er greitt, verður so borað einar 20 metrar fram, áðrenn næstu forboringarnar verða gjørdar aftur. Hetta ger, at teir allatíðina eru framman fyri, og at trygdin er á høgum støði.

Um vatn verður funnið, so verður tað sum sagt tett, so verður aftur bora fyri at vita, um tað er eydnast at tetta og so framvegis.

Dávur Reinert Hansen sigur, at arbeiðið gongur framvegis skjótt og væl, hóast tað seinkar nakað, tá forboringarnar staðfesta vatn í tunlinum.

– Higartil hevur tilfarið í tunlinum verið betur enn væntað, men nú letur tað til, at vit eru komin í tað tilfarið, sum vit frammanundan høvdu væntað Borðoyarmegin, sigur stjórin í Norðoyatunlinum.

Seinasta vika var ikki so góð, sum onkur onnur hevur verið, tá tað kemur til tal av boraðum metrum, men hetta komst einamest av, at menninir vóru á tveir daga skeiði um arbeiðsháttin og annað.

**- sae –**




*Sum støðumyndin frá mánadegnum vísir restaðu bert 55 metrar í til tann fyrsti kilometurin Borðoyarmegin er boraður. Hinvegin tátta teir Leirvíksmegin skjótt í tveir kilometrar*
*Mynd: www.tunnil.fo*

## Tað er bara eitt menn

**Fundur undir heitinum, »Tað er bara eitt menn«, verður í húsunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag í Bøgøtu mánakvøldið 20. septembur frá klokkan 19.00-21.30**

**Tíðindaskriv**



Endamálið við fundinum er at gera kvinnur tilvitaðar um – og at økja um kvinnurnar lut í – politisku avgerðarprosessini.

Tað verður Bjørt Samuelsen tíðindakvinna, sum fer at stýra fundinum. Rúna Sivertsen fer at greiða frá, hvønn týdning tað hevur, at kvinnur eru við, har samfelagsligu avgerðirnar verða tiknar. Síðani fara kvinnuligir politikkarar í norðoyggjum at fortelja frá bæði álvarsligum og skemtiligum up-pliv-ingum í samband við politiska arbeiðið.

Síðani verður lagt upp til kjak.

Tað er ein áhugabólkur hjá Húsmøðrafelagnum, ið skipar fyri hesum fundi, sum er ópolitiskur. Eftir fundin bjóðar áhugabólkurin ein drekkamunn.

Hugskotið til fundin er sprottið úr tí seminari, sum var á Hotel Føroyum í august fyri kvinnuligar tinglimir í útnorðurlondum.